## Ståle tekur ábyrgdina á seg

FC Keypmannahavn hevur ikki staðið seg so væl í hesum kappingarárinum, sum felagið plagar, og tað venjarin hjá FCK, Ståle Solbakken, tekur ábyrgdina fyri vánaliga kappingarárið.- Vit hava ikki verið nóg góðiri ár, og orsøkin er, at eg havi ikki verið nóg dugnaligur til at fáa spælararnar at passa til okkara konsept, sigur Ståle Solbakken. Hann fegnast tó um, at FCK framvegis hevur møguleikan



## Brynja seg til næsta ár

Enska fótbóltskappingin er ikki meira enn liðugt, so eru feløgini farin í holt við at keypa spælarar til næsta kappingarár. Stjórin í Manchester United sigur, at felagið fer ikki at smæðast við at keypa dýrar spælarar í summar, og Chelsea hevur longu keypt fyrsta spælaran. Tað er 26 ára gamli verjuspælarin José Bosingwa, sum hevur spælt seks landsdystir fyri Portugal. Hann kostar enska felagnum umleið 150 milliónir krónur.

# Giggs setti punktum

**Í sínum dysti nummar 758 – ein tangering av metinum hjá Bobby Charlton – staðfesti Ryan Giggs sítt 10. og tað 17. meistaraheitið hjá Manchester United**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Tað var Rio Ferdinand, sum bara liðskiparabindið um armin, men sjálvandi var tað Ryan Giggs, sum slapp upp at taka ímóti stóra steypinum*
*Mynd: Polfoto/AP*

Leikluturin hjá nú 34 ára gamla walisaranum hevur kanska verið sjónligari til tíðir. Seinasta partin av hesum kappingarárinum hevur tað ofta verið sum skiftisleikari, at hann hevur fingið dystartalið enn longur uppeftir, men hansara partur hevur ikki ligið eftir í dominansinum, sum Manchester United hevur havt í enskum fótbólti seinastu 15 árini.

Og tí kundi handritið valla verið betur skrivað, tá hann kom inn á vøllin í seinasta dystinum hetta kappingarárið.

Við Chelesa lúrandi í bakhjólinum skuldi Manchester United vinna dystin móti Wigan, um gullið skuldi tryggjast, men hóast 1-0 leiðslu, gekst striltið at fáa málið, sum kundi taka luftina úr spenninginum. Wigan hevði sínar orsøkir til at kenna seg snýttar, tá dómarin ikki sá armin, sum Rio Ferdinand nýtti, tá støðan framvegis var 0-0. Og tað bøtti neyvan um lagið hjá vertunum, at tað júst var eitt brotsspark, sum gav Cristiano Ronaldo høvið at skjóta sítt 31. mál í Premier League hetta kappingarárið. Í seinna hálvleiki vóru tað tó gestirnir, sum kendu seg snýttar. Ikki minst, tá beinini vórðu feigaði undan Scholes inni í brotsteiginum, uttan at hetta tó kostaði nakað sum helst.

Til tíðir kendist spælið meira enn eitt sindur nervakent, men tað var altso Giggs, sum fekk nervarnar í rættlag. Wigan-verjan gloymdi eftiransingunum eina løtu, og tá Rooney stakk bóltin til Giggs, var roynda vinstra beinið ísakalt. Gullið var enn eina ferð komið til Old Trafford! At Chelsea so mest sum heilkiksaði, tá Bolton seint í dystinum javnaði leiðsluna, sum Shevchenko hevði skotið til avbjóðararnar, hevði minni upp á seg.

### Eykavinningur til Fulham

Aðra staðni í Premier League var tað ikki gull men bjargingin, sum taldi. Og her gjørdist fyrrverandi venjarin hjá Toda Jónsson stóri vinnarin, tá Roy Hodgson og Fulham vunnu nervakríggið.

Tað hevur annars ikki staðið nakað serligt til hjá Fulham, men seinastu tríggjar dystirnar vann liðið níggju stig, og tað var akkurát nóg mikið til at basa Reading og Birmingham.

Og nú røkist enntá fyri, at Fulham eisini sleppur út í Europa komandi kappingarár. UEFA letur nevnliga á hvørjum ári serstøk Fair-Play pláss, og eftir at Manchester City fekk reytt kort ímóti sær, tá teir vórðu gjøgnumbankaðir av Middlesbrough, liggur Fulham bráðliga heilt væl fyri í tí kappingini. Enn er tó ikki endaliga greitt, um Fulham fær plássið.

### FAKTA um dystin

| | |
|---|---|
| Birmingham-Blackburn | 4-1 |
| Chelsea-Bolton | 1-1 |
| Derby-Reading | 0-4 |
| Portsmouth-Fulham | 0-1 |
| Sunderland-Arsenal | 0-1 |
| Tottenham-Liverpool | 0-2 |
| West Ham-Aston Villa | 2-2 |
| Wigan-Manchester United | 0-2 |
| Middlesbrough-Manchester City | 8-1 |
| Everton-Newcastle | 3-1 |

## Overfegin Fergie

**Giggs og Ronaldo fingu størstu rósurnar, men Sir Alex Ferguson roknar við, at dagsins Manchester United hevur góðskuna til at metast millum tey bestu í søguni hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sir Alex Feguson hevur roynt opg vunnið meira enn flestu aðrir venjarar. Eftir 10. meistaraheitið við Manchester United var smílið sjálvandi stórt, men hóast talan hevur verið um eitt liðavrik gjøgnum árið, tosaði skotski venjarin fyrst og fremst um tveir av sínum monnum. Nevnliga Ronaldo og Ryan Giggs.

- Ronaldo hevur verið fantastiskur. At ein kantspælari fær 41 mál er púrasta sensationelt. Og tað var sjálvandi eisini fantastiskt hjá Ryan, at hann skuldi skora eitt so avgerandi mál í dystinum, sum hann javnar metið hjá Charlton. Kanska var tað bara lagnan, ið vildi tað so.

### Bjørt framtíð

Talan er at kalla um triðja ættarliðið av Manchester United, sum Ferguson nú hevur leitt til tvey meistaraheiti á rað. Eisini hóast Giggs enn er felagsnevnarin millum meistararnar frá 1993 og 2008.

- Vinna vit eisini Champions League, mást tú seta hetta liðið á ovastu tindarnar í fótbóltssøguni. Og hetta er eitt komandi lið. Vanliga hava europiskir meistarar ein meðalaldur um tey 29, men vit hava hópin av ungum spælarum.

- Rooyney, Ronaldo, Tevez, Anderson, Nani og Fletcher eru allir ungir, og hava eina bjarta fótbóltsframtíð fyri sær. Men tú hevur eisini tørv á royndum spælarum. Spælarum sum Rayn Giggs, Paul Scholes og Edwin van der Sar. Tað eru slíkir, sum geva teimum ungu spælarunum møguleikan at mennast.

Men hóast bjørtu útlitini, so torir Sir Alex als ikki at siga, at hetta liðið fer at seta set eins tungt á ensku fótbóltstrúnuna, sum lið hansara gjørdi í 90'unum.

- Eg rokni við, at Arsenal verða sera sterkir, og at Liverpool fer at styrkja sær um hópin við fleiri spælarum. Hvat Chelsea ger, veit eg ikki, men teir hava longu ein sera sterkan hóp. Everton hevur eisini gjørt stór framstig við David Moyes sum venjara, og Tottenham tekur seg støðugt fram, so eg eri vísur í, at vit ikki fáa møguleikan at dominera á sama hátt, sum vit gjørdu tá, segði Ferguson við ensku miðlarnar, tá gullið var komið til høldar.



*Eftiir meira enn 18 árum í felagnum hevur Sir Alex Ferguson framvegis hug at vinna fleiri steyp og sigrar við Manchester United*